BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

9. apríl 2025
Mál: 22/22133-121
Viðgjørt: JáR

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-094/2024 frá Dennis Holm, løgtingsmanni, eftir § 52a í Tingskipanini, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmál um næmingaheim við Heilsuskúla Føroya.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at taka stig til, at tað verður bygt eitt næmingaheim við Heilsuskúla Føroya?

Svar

Til sp. 1. Í verandi løtu eru ongar ítøkiligar ætlanir um at taka stig til at byggja næmingaheim við Heilsuskúla Føroya. Sambært Heilsuskúla Føroya hevur tað ikki verið nakar stórvegis trupulleiki hjá næmingum at finna bústað, og hevur skúlin í hesum sambandi gjørt eina undirsíðu á heimasíðu sínari, har útleigarar kunnu bjóða bústaðir út til næmingar. Hugsanin er, at henda síða miðlar samband millum útleigarar og leigarar.

Tað er tó ikki óhugsandi, at tørvur verður á fleiri næmingabústøðum, nú umsøkjaratalið til Heilsuskúla Føroya er vaksið. Landsstýrismaðurin er sinnaður at taka málið upp, um so er, at tað vísir seg at vera ein størri tørvur. Harumframt skal vísast á, at lestrarbústaðir eisini eru partur av virkseminum hjá bústaðarfelagnum Bústaðir, og er ein møguleiki í hesum sambandi at taka stig til at kanna tørvin og møguleikarnar saman við Bústøðum.

Nevnast skal eisini, at privat vinnurekandi hava áhuga fyri at fara undir at byggja ella leiga út bygning til næmingaheim.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður